# Tingmaður hartar Kringvarpið

**- Ójólalig kringvarpsleiðsla! Tað er skoðsmálið, sum John Johannessen, løgtingsmaður, gevur kringvarpsleiðsluni sum fyri fyrstu ferð í manna minni onga jólasøgu hevði til børnini í morgun – fyrsta morgunin í jólamánaðinum**

JÓL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Umframt teir klassisku dólgarnar, so fer sjónvarpið at endursenda Jólagøtuna frá 2005, har Lív Reinert Kjeld skipaði var vertur*

- Í ein mansaldur – í góðum og ringum tíðum - hevur útvarpið klárað at bjóðað eina jólasøgu til børnini hvønn morgun í desember. Men eisini hesum hevur nýggja kringvarpsleiðslan beint fyri, sigur John Johannessen, løgtingsmaður.

Hann vísir á, at børnini sótu sum á nálum í morgun. Nú var umsíðir 1. desember. Dagurin tá fyrsta lúkan í jólakalendaranum skuldi latast upp, og ikki minst var árliga, hugnaliga jólasøgan í útvarpinum væntandi. Siðbundna tiltakið, sum hevur ríkað um jólahýrin hjá fleiri ættarliðum næstan síðani Útvarp Føroya bleiv til.

- Sjálvur minnist eg serliga, hvussu jólahýrurin breiddi seg í barnahjartanum, tá hugfarsliga og eyðkenda røddin hjá Oskari Hermannsson hoyrdist í lurtinum. Men 1. desember 2009 skuldi vera ørðvísi. Hesaferð skuldi lisens fíggjaða almenna public service kringvarpið ikki borðreiða við nøkrum jólaligum til børnini. Helst er umberingin vánalig fíggjarorka. Men stovnurin hevur sanniliga verið verri fyri fíggjarliga áður og kortini megnað sínar uppgávur. Harumframt er savnið á tremur við jólakaledarum frá undanfarnum árum. Ein slíkur kundi verið sendur uttan trupulleikar og uttan kostnað, heldur løgtingsmaðurin.

John Johannessen sigur, at eftirhondini er tað bart út sagt troyttandi áhaldandi demonstrativt at fáa at vita, hvat ikki ber til fyri 63 mió., heldur enn at fáa at vita, hvat ber til.

- Man kundi freistast at hugsað, at nýggja leiðslan í Kringvarpinum ikki sær seg sum ein public service tænara hjá lurtarum og hyggjarum, men heldur sær lurtarar og hyggjarar sum ein dagligan trupulleika, sigur hann.

# Børnini fáa kortini skerdan jólakalendara

JÓL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tann 7. desember fer útvarpið hjá Kringvarpinum at endursenda jólakalendaran »Stjørnan, ið hvarv«.

– So vit eru ikki so ójólalig kortini, sigur Solby A. Eliasen, programmleiðari í Kringvarpinum.

Hon viðgongur kortini, at tað var eitt sindur undarligt, at eingin jólakalendari var í morgun. Jólakalendarin, sum tey fara at senda, hevur 14 partar, og tí verða teir sendir hvønn gerandisdag frá 7. desember.

Annars fer sjónvarpið hjá Kringvarpinum at senda ein tíma hvørt kvøld til børnini. Hóast talan har eisini er um endursendingar, so munnu nógv gleða seg til at síggja Dólgarnar aftur, sum vórðu sendir fyri eini 20 árum síðani. Hin sendingin er Jólagøtan, sum var send fyri fýra árum síðani. Tann sendingin varð tikin upp úti á Reyni í Havn.

## Broyttar upp- og afturlatingartíðir

Frá 1. desember verða upp- og afturlatingar tíðirnar hjá Rúsdrekkasølu Landsins broyttar soleiðis:

**Tórshavn:**

mánadag til mikudag: **10.00 - 17.30**
hósdag og fríggjadag: **10.00 - 18.00**

**Saltangará, Klaksvík, Drelnes, Miðvágur og Skálavík:**

mánadag til mikudag: **12.00 - 17.30**
hósdag og fríggjadag: **12.00 - 18.00**

www.rusan.fo

RÚSDREKKASØLA LANDSINS

sansir.fo